# Nú kemur nýggja telefonbókin

**Nýggja telefonbókin er vaksin við 20 síðum síðani seinast. Hon telur 676 síður og er prentað í 30.500 eintøkum**




Telefonbøkurnar koma í hesari vikuni og verða liðugt útbornar um mánaðarskiftið mars/apríl. Borið verður út til allar fastnets kundar í Føroyum, og eru tað fleiri enn 26.000 bøkur, ið skulu berast út. Postverk Føroya hevur útberingina um hendi.

Fartelefonkundar í Føroyum fáa ikki bókina sendandi, men hesi hava møguleika at ogna sær eintøk í Telebúðunum kring landið fyri 50 kr. eintakið. Í ár eru telefonbøkurnar bara framleiddar við vanligari permu (Paperbacks-cover). Eins og undafarnu ár verða Teletíðarkundar ikki upptiknir í telefonbókini.

Telefonbókin 2004 er prentað í 30.500 eintøkum á Prentsmiðjuni Oddi hf. í Reykjavík. Í vavi er telefonbókin 2004 vorðin 20 síður fleiri og telur nú 676 síður.

Av størri broytingum kann nevnast, at GSM-kundar hjá Kall Telecom eisini eru við.

Harumframt er eitt yvirlit á Bláu síðunum, sum vísur allar tænastur hjá Føroya Tele. Tænasturnar eru vístar í bókstavarøð, soleiðis at lættari er at finna tær.

Føroya Tele vónar, at Telefonbókin verður hent at hava í árinum 2004, sum tykist gerast eitt spennandi ár á fjarskiftisøkinum.

# Eins nógvar kvinnur og menn

**Sjálvstýrisflokkurin hevið landsfund um vikuskiftið. Har var m. a. samtykt at stilla upp eins nógvar kvinnur og menn til komandi val**

POLITIKKUR

– Sjálvstýristilgongdin heldur fram. Eitt av yvirtøkumálunum, sum Sjálvstýrisflokkurin raðfestir høgt, er fólkakirkjan. Arbeiðið at yvirtaka fólkakirkjuna eigur at vera tikið uppaftur beinanvegin. Hetta verður gjørt í samráð við allar partar.

Hetta sigur Sjálvstýrisflokkurin m. a. í yvirlýsingini eftir landsfundin leygardagin.

Sjálvstýrisflokkurin heldur eisini fast við, at tað almenna ikki eigur at fara inn at veita vinnuni rakstrar- og íløgustudning, hóast einstakar vinnur eru illa fyri, og búskaparligu útlitini ikki eru av teimum allarbestu. Politikkarar mugu ikki halda, at teir duga betri enn vinnan sjálv at virka og raðfesta. Tað skal verða greiður skilnaður millum politikkarar og vinnulívið, eisini tá tað leikar hart á.

Flokkurin heldur eisini, at verulig gongd eigur at fáast á privatiseringarnar av almennum fyritøkum. Tað almenna eigur ikki at binda pening í fyritøkur, sum fult so gott kundu verið privatar. Heldur átti peningurin at verið brúktur, har hann gjørdi størri gagn fyri borgararnar, til dømis til at rinda skuld.

– Málsetningurin hjá flokkinum til næsta val er at hava helvt um helvt av monnum og kvinnum uppstillað í hvørjum valdømi, sigur flokkurin at enda í yvirlýsingini frá landsfundinum.

# Eldur í Amager

**Nógvir føroyingar hvukku við, tá tað fréttist, at eldur var í tveimum hæddum á Oyrasundskollegiinum. Talan var kortini um grannabygningin, har tvær íbúðir kolaðust upp**

ELDSBRUNI
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*



*Eingin av teimum fimm fólkunum, ið vórðu innløgd eftir eldsbrunan í grannabygninginum hjá Oyrasundskollegiinum mándagin, fekk álvarsligan skaða*

*Símun J. Hansen*

Um trítíðina seinnapartin mánadagin ljóðaði, at eldur var í Oyrasundskollegiinum á Amager í Keypmannahavn, har rættuliga nógvir lesandi føroyingar búgva.

Bæði Ekstrablaðið og BT skrivaðu um eldin á heimasíðum sínum, og har ljóðaði, at tvær tær ovastu hæddirnar stóðu í ljósum loga, og at sjey fólk vóru flutt á sjúkrahús.

Talan var kortini ikki um Oyrasundskollegiið, men grannabygningin, ein íbúðarblokk í Dalslandsgade 18. Eldur var í á sættu og sjeyndu hædd.

Meðan login stóð meturhøgur úr bygninginum, og tjúkkur roykur leygast yvir Amager, vórðu fimm fólk flutt á sjúkrahús.

Tvey teirra høvdu fingið lættari brunasár, tvey høvdu andað royk í seg og ein hevði fingið sjokk. Eingin teirra fekk álvarsligan skaða, sigur Niels Ole Blirup við BT.

Kortini var ein kvinna, ið var stødd í aðrari íbúðini, sum brann, eina løtu í lívsvanda, men hon varð kortini skjótt bjargað.

Eldur breiddi seg skjott, tí bløð, pappír og annað lá í hálvan annan meturs hædd í íbúðini, segði sløkkiliðsleiðarin.

Tvær íbúðir kolaðust upp, og umfatandi royk- og vatnskaði stóðst av eldinum.

Íbúgvarnir í 14 øðrum íbúðum vórðu evakueraðir, tá stóra liðið við 50 sløkkiliðsfólkum og 12 sløkkiliðsbilum kom á staðið.

Um fýratíðina hevði sløkkiliðið tamarhald á eldinum, og seinast vit fréttu, var einki greitt um orsøkina.

# Dejavu í Badnmintonhøllini

**Leygarkvøldið tann 13. mars verður ein spennandi konsert í badmintonhøllini. Tá fara Navnkendu »Dejavu« at hava konsert.**

KONSERT
Tíðindaskriv

Dejavu hava ikki verið á palli og spælt til almenna konsert síðan Prix Føroyar finaluna í 2003. Hóast tað, so hava teir ikki lagt ljóðførini til viks. Heldur tvørtur ímóti, tí teir eru júst lidnir við at spæla inn eina fløgu,og um alt gongur sum ætlað, kemur hon út í ár. Teir í Dejavu siga, at innspælingin av allari fløguni hevur gingið fyri seg í tí víðagitna Lundgaardstudio í Danmark. So talan er um eina sera góðskugóða fløgu, sum vit mugu bíða eitt sindur eftir enn, tí hon fyrst skal ljóðblandast.

Men um tú vilt hava møguleikan at fáa ein forsmakk upp á hesa fløguútgávu, so er bara at leita sær niðan í Badmintonhøllina leygarkvøldið.

Til tey sum ikki vita tað, so vóru Dejavu í veruleikanum teir, ið áttu at vunnið Prixið, í hvussu so er, um ein lesur tað, sum skrivað var beint eftir at finalan hevði hevði verið. Í einum broti úr einari yvirskrift varð skrivað soleiðis: »Føroysku dómararnir og fólkið peikaðu á Déjá Vu« og ikki kann sigast annað enn, at teir spældu sera væl.



Umframt konsert, verður eisini DJ-SHOW við DJ-scra-tcharanum »DJ-Switch«, sum Pætur M. hevur valt at kalla seg. Tiltakið byrjar kl.23:30.



# Ársfundur hjá NAMMCO

**Er nebbafiskastovnurin við Føroyar í heila tikið ein stovnur? Hvussu nógv verður árliga dripið av kópi í Føroyum? Er tað skilagott at kópastovnurin við Grønland og Kanada veksur enn meira, og hvat skal gerast fyri illa fyrikomna náhvalin í sama øki. Hesi mál eru sett á dagsskrá hjá NAMMCO, sum í seinastu viku valdi Kate Sanderson til forkvinnu**

NAMMCO
*Jón Brian Hvidtfeldt*
*jonbrian@sosialurin.fo*




*Á ársfundinum hjá NAMMCO, ið varð hildin í Føroyum í síðstu viku, varð Kate Sanderson, t.v. á myndini vald til forkvinnu komandi tvey árini.*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Í farnu viku helt felagsskapurin NAMMCO ársfund í Føroyum. Fleiri týðandi mál vóru á ársfundinum. Millum annað varð komið inn á spurningin um, hvørt tað er rætt at kópastovnurin, bæði millum Grønland og Kanada, og í Eysturgrønlandi eystur móti Norra og Russlandi, eigur at vaksa enn meira. Stovnarnir eru væl fyri og í vøkstri, og telja nú ávíkavist fimm milliónir og tvær milliónir kópar.

Ein arbeiðsbólkur, umboðandi ICES og NAFO, arbeiðir í løtuni við spurninginum, og har vil NAMMCO lata sína ráðgeving.

– Fleiri kanningar eru gjørdar av, hvat og hvussu nógv av fiski kópastovnurin etur, og talan er um rættuliga stórar nøgdir, sigur Kate Sanderson og heldur fram:

– Tí er rætt at spyrja, um rætt er at lata stovnin vaksa enn meira?

Hon vísir á, at spurningurin eisini er viðkomandi fyri føroyingar, tí føroyingar fiska í økinum, og tískil hava tískil áhuga fyri stovninum.

Ársfundurin hjá NAMMCO valdi Kate Sanderson til forkvinnu, í fyrstu atløgu í tvey ár. Limalondini skiftast um at hava formansskapin í felagsskapinum, hvørs uppgáva er at granska í og samstarva um varðveitslu av súgdjórum havinum. Kjartan Hoydal var fyrsti formaður eftir stovnanina í 1992, og nú er túrurin aftur komin til Føroya.

## Nebbafiskurin

Fyri tveimum árum síðan vístu kanningar av nebbafiski í føroyskum øki, at stovnurin var sera illa fyri. Men samtíðis settu granskarar spurnartekin við, um talan í veruleikanum var um ein føroyskan stovn, ella nebbafiskurin í føroyskum øki annaðhvørt var partur av íslendska ella kanska norska stovninum.

– NAMMCO hevur sett sær fyri at fáa kannað henda spurning nærri. Bæði støddina á stovninum, og hvørt talan er um ein føroyskan stovn. Hetta er neyðugt, um tað í framtíðini skal bera til at umsita og røkja ein tílíkan stovn, vísir Kate Sanderson á.

Kate Sanderson greiðir frá, at eftir at íslendingar herfyri fóru undir at veiða stórhval til vísindalig endamál, hava teir nú boðað frá, at teir eisini ætla at veiða nebbafisk í íslendskum øki til vísindalig endamál. Og tær upplýsingar kunnu møguliga siga nakað um nebbafiskin á okkara leiðum, vísir hon á.

## Føroyski kópurin

Ein annar spurningur, ið NAMMCO ætlar sær at arbeiða fyri, er at fáa greiðu á, hvussu nógv verður dripið av kópi í Føroyum árliga.

Kanningar higartil hava víst, at kópastovnarnir eru lokalir stovnar, tvs. at føroyski stovnurin til dømis ikki hevur samband við íslendska stovnin.

– Men vit mangla upplýsingar um føroyska stovnin. Serliga, hvussu nógv verður dripið av kópi í Føroyum um árið, sigur Kate Sanderson.

Kópurin hevur lyndi til at gera seg inn á aliringar, og tí hava alarar loyvi til at skjóta kópin. Men neyv tøl fyri, hvussu nógv verður skotið, finnast ikki, vísir Kate Sanderson á.

## Náhvalurin

Niðurstøðan í eini frágreiðing hjá vísundaligu nevndini hjá NAMMCO er, at náhvalastovnurin (á donskum narhval), ið heldur til millum Grønland og Kanada, er illa fyri. Men hóast hesa staðfesting fer NAMMCO ikki so langt sum at mæla til at áseta kvotu á stovnin.

– Vit eru samd um at støðan er álvarsom, og at okkurt má gerast fyri at varðveita stovnin, sigur Kate Sanderson.

Men av tí at stovnurin heldur til í einum øki, sum bæði fevnir um eitt limaland og eitt land, ið ikki er limur, rennir felagsskapurin seg í ein trupulleika.

## Limaland ella ei

Kate Sanderson vísir á, at semja er ikki millum tey fýra londini í NAMMCO um, hvussu nógv til ber at úttala seg um viðurskifti, ið røkka longur enn til bert at fevna um limalondini.

– Sjálv haldi eg, at tá vit fáa metingar frá serfrøðingum, so má felagsskapurin kunna úttala seg so neyvt sum gjørligt um málið, sigur Kate Sanderson og vísir á omanfyri nevnda dømi um náhvalin, ið svimur í grønlendskum og kanadiskum øki.

Sum longu nevnt er Kanada ikki limur í NAMMCO, men hevur tó eygleiðarastøðu. Og at landið veruliga hevur áhuga fyri felagsskapinum sæst millum aftur í, at Kanada sendir vísindafólk til fundirnar hjá NAMMCO, vísir Kate Sanderson á.

– Eftir mínum tykki er tað ikki nóg greitt, hvat NAMMCO kann úttala seg um, og hesi viðurskifti ætli eg at arbeiða fyri at bøta um, sigur Kate Sanderson.

## Skera kóp á Bryggjuni

Uppgávan hjá nýggja formanninum í NAMMCO; Kate Sanderson, verður fyrst og fremst at røkja samskifti millum limalondini og eygleiðaralondini í felagsskapinum. NAMMCO hevur skrivstovu í norska býnum Tromsø, ið tekur sær av dagliga rakstrinum.

Kate Sanderson nevnir tvey tiltøk, ið eru á skránni í ár. 7. til 9. september fer NAMMCO at skipa fyri einum tiltaki á Norðuratlantisku bryggjuni í Keypmannahavn, ið fer at snúgva seg um veiðuháttir og avlíving av kópi.

Og seinni í heyst kemur vísindaliga nevndin hjá NAMMCO til Føroya at halda sín árliga fund.

Næsti ársfundurin hjá NAMMCO verður í Norra í marts næsta ár.

### Fakta

Felagsskapurin NAMMCO, ið er stytting fyri North Atlantic Marine Mammal Commission, varð stovnaður 9. apríl 1992. Limalond eru Ísland, Norra, Grønland og Føroyar, meðan Kanada, Japan, Russland og Danmark eru eygleiðarar.

Uppgávan hjá NAMMCO er at granska, samstarva og gera tilmæli um at røkja súgdjórastovnarnar í Norðuratlantshavi á besta hátt.

Bjørn Kalsø:

# Eg eri grindamaður

**– Vit mugu duga betur at nýta havið á burðardyggan hátt, og viðgera fiski- og hvalaveiðu í somu heild, segði Bjørn Kalsø, landsstýrismaður í fiskivinnumálum, í fyrstu almennu røðu síni, tá hann setti 13. ársfundin hjá NAMMCO**

NAMMCO
*Jón Brian Hvidtfeldt*
*jonbrian@sosialurin.fo*



*Setanin av ársfundinum hjá NAMMCO var fyrsta almenna røðan hjá Bjørn Kalsø, landsstýrismanni í fiskivinnumálum*

Fyrsta almenna røðan hjá nýútnevnda landsstýrismanninum í fiskivinnumálum var at seta 13. ársfundin hjá felagsskapinum NAMMCO, ið var í Føroyum í síðstu viku.

Í røðu síni nevndi Bjørn Kalsø, at hann, sum so mangir aðrir føroyingar, er grindamaður og tekur lut í grindadrápi, so ofta sum tilber.

– Eisini taki eg børnini við mær í grind. Tey skulu læra at drepa grind, so tey kunnu vera við til at halda lív í hesum kunnleika og fáa virðing fyri, hvaðan maturin kemur. Tað er avgerandi fyri framtíð okkara at børnini skilja, hvussu stóran týdning tilfeingið í havinum hevur fyri okkum, og hví vit skulu fara væl um tilfeingið, segði Bjørn Kalsø.

Landsstýrismaðurin førdi fram, at síðan NAMMCO varð stovnað í 1992 er felagsskapurin vorðin ein altjóða leikari í samstarvinum um at varðveita, umsita og kanna súgdjórini í havinum.

## Burðardygt

Bjørn Kalsø vísti á, at sum fiskivinnutjóðir eiga limalondini í NAMMCO altíð at hava hava sum grundsjónarmið í umsiting og samstarvi, at farið verður við tilfeinginum á burðardyggan hátt.

– Hetta grundsjónarmið fevnir um alt tilfeingið - eisini hval og kóp, legði Bjørn Kalsø dent á.

Hann vísti á, at vit mugu duga betur at viðgera fiski- og hvalaveiðu í somu heild, og síggja tilfeingið í havinum sum eina heild. Landsstýrismaðurin segði seg fegnast um, at NAMMCO gongur á odda fyri at fáa hesi mál á dagsskránna.